# Býráðið

**Dagfesting:** 08.11.2024 kl. 16:30
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 41/24 | 24/00568-1 | Ískoytissáttmála til verandi Framvit sáttmála |
| **Til kunning** | | |
| | | |

1

**Til støðutakan**

## 41/24
## 24/00568-1 Ískoytissáttmála til verandi Framvit sáttmála

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 08.11.2024 | 41/24 |
| 2 Mentamálanevndin | 08.11.2024 | 35/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.11.2024 | 63/24 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Mentamálanevndin, Fíggjarnevndini og Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna skrivaðu 11. juli 2019 undir sáttmála um skúlasamstarv, kallað Framvit. Samstarvið er um næmingar eftir 7. skúlaár.<br><br>Í avtaluni er millum annað ásett,:<br>• At stýri verður valt, 2 úr hvørjari kommunu, at umsita fyrisiting og rakstur hjá Framvit<br>• At kommunurnar velja hvør sín skúlastýrislim í Fuglafjarðar skúla<br>• At kommunurnar rinda sín part av rakstrarútreiðslunum, sambært fíggjarætlan løgd fyri býráðini<br>• At kommunurnar rinda sín lutfalsliga part av íløgunum í 64-skúlan, í mun til næmingatalið í báðum kommununum frá 1. til 9. flokk.<br>• At tilmælið um íløgur skal góðkennast av kommunustýrunum báðum<br>• At sáttmálin tekur við 1. august 2019 og kann uppsigast við 3 ára freist, tó ikki at fara út gildi fyrr enn 1. august 2039.<br>• At samstarvið kann uppsigast um kommunurnar eru samdar um hetta ella, at landsstýrisfólkið eftir áheitan frá eini kommununi, metir at rímilig orsøk er til uppathald.<br><br>Sitandi kommunustýri fyri Eysturkommunu, sum tók við 1. Januar 2021, hevur frá fyrst í setuni boðað frá, at tað ikki tekur undir við tí partinum av sáttmálanum, sum viðvíkur íløgupartinum í 64-skúlan.<br><br>14. juli 2023 sendir borgarstjórin í Eysturkommunu skriv millum annað við áheitan um, at fáa semju við Fuglafjarðar kommunu um, at enda |

2

| | |
|---|---|
| | samstarvið um Framvit og at teir hava havt fund við landsstýrismannin um málið.<br><br>10. august 2023 svarar borgarstjórin í Fuglafirði aftur har hann mælir til at kommunustjórarnir koma við uppskoti til Framvit stýrið um øðrvísi fíggingarleist av íløgunum, áðrenn málið verður viðgjørt í politisku skipanini.<br><br>12. september 2023 sendir starvsfólkahópurin í Fuglafjarðar skúla inniliga áheitan á kommunurnar og avvarandi landstýrismann um, at halda fast við Framvit samstarvið.<br><br>29. november 2023, sendir borgarstjórin í Fuglafjarðar kommunu kunning og áheitan á avvarandi landsstýrimann um at koma við uppskoti til hvussu farast skal víðari við málinum.<br><br>20. desember 2023 kemur svar frá avvarandi landsstýrimanni har ráðið millum annað ásannar at "verandi støða ikki heldur í longdini" og at hann fer at kallað partarnar inn.<br><br>10. apríl 2024, samtykkir stýrið fyri Framvit at fara undir samráðingar við tí endamáli, at fáa eina loysn á ósemjuni.<br><br>Síðani hava fundir verið millum annað í Glyvralon og kommunuskrivstovuni í Eysturkommunu har arbeitt hevur verið við málinum. Úrslitið av hesum samráðingum er ískoyti til sáttmálan, sum her verður lagt fyri mentamálanevndina, fíggjarnevndina og býráðið, at viðgera.<br><br>Ískoyti hevur hesar broytingar í mun til upprunaligu avtaluna um skúlasamstarv:<br>1. Eitt loft uppá 12 mió. kr. verður sett á íløgupartin hjá Eysturkommunu, í 64-skúlan.<br>2. Sáttmálatíðarskeiðið verður stytt frá 2039 til august 2035, við møguleika fyri at annar parturin kann uppsiga sáttmálan 1. august 2028, at fara úr gildi 1. august 2031.<br>3. At ískoyti verður lagt fyri landsstýrisfólkið til góðkenningar. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært §51 í kommunustýrislógini skulu samstarvsavtalur um kommunusamstørv góðkennast av landsstýrismanninum og skulu hesar frammanundan vera góðkendar av kommunustýrunum í avvarandi kommunum. |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>• Kommunustýrislógin<br>**Møgulig fylgiskjøl**<br>• Bræv til FF (bræv frá borgastjóranum í EyK til FK) |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | • Framvit sáttmálin (Sáttmálin frá 11. Juli 2019)<br>• Ískoyti Framvit sáttmáli (uppskotið frá Framvit til kommunustýrini)<br>• Svar uppá – Bræv til FF ( bræv frá borgastjóranum í FK til EyK)<br>• Innilig áheitan frá starvsfólkahópinum í Fuglafjarðar skúla<br>• Kunning og áheitan á avvarandi landsstýrismannin um Framvit<br>• Svar frá Landsstýrismanninum í BUMR<br>• Notat frá Framvit fundi 10. apríl 2024<br>• Fylgiskjal 1 - 64 skúlin umbyggingarætlan september 2024 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | J | J |
| | Umsitingarligar | N | N |
| Tilmæli | Borgarstjórin hevði ynskt at partarnir hildu seg til upprunaligu avtaluna, og ásannar, at hin parturin ikki ynskir hetta. Tá allar íløgur skulu góðkennast av báðum býráðum hevur hetta viðført at støðan hevur verið og er fastløst. Semja er í Framvit um ískoyti, sum bæði gevur eitt íøkiligt íkast til og loysir upp við at farast kann í gongd við at umvæla 64-skúlan. Tí mælir borgarstjórin til, at mentamálanevndin, Fíggjarnevndin og býráðið taka undir við uppskotinum til ískoyti til Framvit sáttmálan.<br><br>Ólavur Larsen mælir til, at komandi býráð skal arbeiða víðari við málinum. | | |
| Dagf | 06.11.2024 | | |



**Mentamálanevndin 08. november 2024:**

Meirilutin í mentamálanevndini, Eyðun á Lakjuni og Edva Jacobsen, taka undir við tilmælinum. Gudny Vang, ger vart við, at málið verður skundað ígjøgnum og nokk av tíð er ikki til at viðgera málið. Sostatt tekur Gudny Vang, ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. november 2024:**
Meirlutin Eyðun á Lakjuni og Dávur Juul taka undir við tilmælinum. Ólavur Larsen tekur ikki undir við tilmælinum tí hann meinar at hetta skal viðgerast av komandi býráð.

**Býráðið 08. november 2024:**
Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Ólavi Larsen. Ólavur Larsen, Gudny Vang, Sonni á Horni og David Andreasen atkvøddu fyri meðan Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu ímóti. Sostatt fall broytingaruppskotið frá Ólavi Larsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá borgrstjóranum. Ólavur Larsen, Gudny Vang, Sonni á Horni og David Andreasen atkvøddu ímóti meðan Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Magni Jøkladal og Edva Jacobsen atkvøddu fyri. Sostatt varð uppskotið um ískoyti til «Framvit» sáttmálan samtykt.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 17.45

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo